# Sjokkviðgerð til B36

*Millum fleiri óvæntað úrslit um vikuskiftið, mundi ÍF sigurin á B36 vera hin mest óvæntaði, men hóast óvæntaður, so var sigurin fullkomuliga uppiborin*

ÍF-B36 3-2 (0-2)

Tað mundu ikki vera tey nógvu, sum væntaðu, at ÍF skuldi gera nakað sum helst við B36, tá liðini bæði hittust í Fuglafirði sunnudagin.Fuglfirðingar noyddust í fjør tungu leiðina úr fyrstu niður í aðru deild, og harumframt hevði liðið eisini mist fleiri av teimum leikarum, sum tá stríddust fyri at halda liðnum í bestu deildini.

B36 hevur hinvegin talst millum fremstu liðini í Føroyum seinastu 3-4 árini, og hóast frágongdin hevur verið stór í vetur, so hevur hugsanin hjá viðhaldsfólkunum helst verið tann, at tilgongdin eisini hevur verið góð, og at hetta saman við egnari framleiðslu skuldi tryggja, at liðið fór at vera eins væl fyri hetta kappingarárið.

### Gekk sum væntað

Sum so mundi gongdin í fyrra hálvleiki eisini vera á eini leið fyri havnarliðið. Vakra fótbóltsspælið, sum liðið hevur sýnt seinnu árini kom ongantíð til sjóndar, men meira týdningarmikið var kanska, at toppskjúttin seinastu tvey árini, Jákup á Borg, sýndi, at hann als ikki troyttur av at skjóta mál enn.

Við stuttum millumbilum skeyt hann tvey mál miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Fyrru ferðini fekk hann tó meira enn góða hjálp frá fuglfirðingum. Verjuleikari var í so óansin, tá hann legði aftur til málverjan, og í staðin fekk bólturin beina kós móti málinum, og eftir at málverjin akkurát fekk hondina á bóltin, støkk hesin út aftur til Jákup, og so var 1-0.

Lítla løtu seinni var aftur galið. ÍF misti bóltin á veg í álop, og tá bólturin var stungin inn um verjuna, sum tá var púra fløt, kundi Jákup enn einaferð seta kós móti málinum, soleiðis at støðan nú var 2-0 til B36.

Løtu seinni var so líkt til, at dysturin væl og virðiliga var taptur hjá fuglfirðingunum, tá Rúni Petersen fekk seinna gula kortið og harvið reytt.

Fuglfirðingar vóru tó alt annað enn nøgdir við dómin frá Oddmari, tá hesin metti at Rúni hevði roynt at spælt sjónleik í kriminella teiginum, fyri á tann hátt at dyrgja eftir einum brotssparki.

Mótmælini hjá ÍF leikarunum bøttu tó lítið, og við 11 móti 10 var líkt til, at B36 longu hevði tryggjað sær sigurin.

### Kendu seg ov tryggar

Helst hildu havnarmenninir eisini sjálvir, at so var, og tað var kanska høvuðsorsøkin til, at seinni hálvleikur gekk, sum hann gekk.

B36, sum nú var uttan smáskadda John Petersen (skiftur út fyri at hvíla eymu lørini) gjørdi so at siga einki um seg, seinastu trý korterini. Miðvøllurin var so at siga ikki við í spælinum, tí roynt var fyri tað mesta við longum sendingum, og hetta gjørdi eisini at undirmannaði miðvøllurin hjá ÍF fekk góðar sømdir.

Rættuliga tíðliga fekk ÍF minkað um munin, tá Bárður á Lakjuni í tveimum atsóknum fekk sent skot móti málinum. Bólturin hevði beina kós upp í málhornið, uttan at Tróndur Vatnhamar hevði nakran møguleika at verja fyri skotinum.

Tá umleið eitt korter var farið, var aftur galið. ÍF leikararnir vunnu bóltin á miðjum vølli, og Eyðolvur Petersen var sendur avstað í høgra borði. Hann megnaði eisini at renna undan B36 verjuni, og sera hegnisliga kipti hann bóltin upp um Trónd og inn í málið.

Løtu seinni kundi støðan verið 3-2 til heimaliðið, men B36 slapp við hvøkkinum, tá heilfluktari varð sendur dygst fram við stongini. So væl sluppu teir ikki, tá hálvleikurin var um at verða hálvrunnin. Bárður fekk fatur á eini tvørsending á miðjuni, og setti beina kós móti málinum. Staddur nakað uttan fyri brotsteigin sendi hann eitt flat skot móti málinum, og bólturin smoygdi sær inn um handara stólpa.



*Íf leikararnir fegnast um seinna málið frá Bárði á Lakjuni, sum tryggjaði teimum óvætnaða 3-2 sigurin á B36*

***mynd: Álvur Haraldsen***

### Bólturin er rundur

Sostatt gjørdist endaliga støðan 3-2 til ÍF, og hesin sigur var ikki eitt mál ov lítið. Tað stutta av tí langa er, at B36 leikararnir vórðu revsaðir, tí teir ikki tóku uppgávuna í nóg stórum álvara, meðan ÍF leikararnir fingu løn fyri stríðið. Teir stríddust í samfullar 90 minuttir, og hóast teir vóru undirmannaðir meira enn helmingin av dystinum, so góvust teir ongantíð á hondum.

Komandi vikuskifti skal B36 á heimavølli spæla botnuppgerð móti B71, meðan ÍF á heimavølli skal dystast um fyribils rættin til fyrsta plássið móti B68, og helst vóru tað ikki mong, sum høvdu væntað at so skuldi verða.

Jú, fótbólturin er eins rundur í ár,sum hann altíð hevur borð orð fyri at vera.

**ÍF-B36 3-2 (0-2)**

0-1 Jákup á Borg
0-2 Jákup á Borg
1-2 Bárður á Lakjuni
2-2 Eyðolvur Petersen
3-2 Báður á Lakjuni

Dómari: Oddmar Andreasen

# Óvæntaður sumbiarsigur

*Við einum heldur óvæntaðu tapi móti Sumba, hava Runavíkingar skapt sær sjálvum eitt torført útgangsstøði í steypakappingini*



*Hóast tað stundum stóð nógv á, so fingu sumbingar trý stig suður aftur við sær*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

NSÍ-Sumba 0-1 (0-1)

Seinastu tvey árini ella so, munnu runavíkingar havt eitt av teimum liðum, sum (tá lagið er hitt rætta) hevur leikt nakað av tí besta fótbóltinum, sum hevur verið at sæð hesi árini.

Fyri tað mesta hava avrikini verið grundað á leikarar, sum allir eru uppaldir í felagnum, og tað man ikki vera nøkur loyna, at NSÍ í skjótt nógv ár hevur havt sera sterkar ungdómsrøðir, har hópurin av heiðursmerkjum eru fingin til vega.

### Krevur tíð

Undan kappingarárinum, sum skjøtul nú er settur, hava runavíkingar tó mist rættuliga fitt av teirri manning, sum hevur tryggjað framgongdini seinnu árini, og stóri spurningurin hevur tí verið, um felagið aftur hevði nýggjar ungar leikarar at seta við.

Eftir dystin sunnudagin má fyribils niðurstøðan vera eitt greitt nei. Ikki tí, einki er at ivast í, at felagið eigur fleiri ungar og evnaríkar leikarar. Um nakar ivast í hesum, kunnu tey bert hyggja at, hvussu samlaða býtið av heiðursmerkjum var undanfarna ár.

Ungu leikararnir hava tó tørv á tíð, har teir spakuliga kunnu búnast, og í øllum førum kann ikki krevjast, at teir beinanvegin skulu teljast millum berandi kreftirnar á besta liði felagsins.

### Einføld uppskrift

Dysturin sunnudagin móti Sumba sýndi rættuliga greitt, at enn eru nógvir lutir, sum skulu fáast upp á pláss, áðrenn felagið aftur kann fara at droyma um europeisku luttøkuna, sum ikki hevur verið so fjar seinnu árini.

Eftir sera einfaldari uppskrift eydnaðist sumbingunum at halda runavíkingunum frá teimum stóru málmøguleikunum í fyrra hálvleiki.

NSÍ leikararnir fingu so at siga frið til teir komu nakað inn á sumbiar hálvuna, og hóast teir fleiri ferðir megnaðu at spæla seg ígjøgnum í síðunum, so stóðust ongar vandamiklar støður av hesum.

Tá sumbingar so fingu fatur á bóltinum, var aloftast roynt við longum sendingum út í borðini, og tað var eftir eina slíka, at einasta málið í dystinum kom. Langur bóltur varð sendir niðan í høgra borð, og tá Jónstein Petersen so royndi at snýta Jan Poulsen, sum eisini elti bóltin, gekk galið. Jan gjørdi skjótt av og sendi bóltin inn fyri málið, har Eirikur Joensen púra ótarnaður kundi stúta bóltin í málið.

### Royndu at trýsta

Í seinna hálvleiki royndu runavíkingarnir at trýsta sumbingarnar enn meira, men hóast nakrir málmøguleikar nú spurdust burtur úr, so megnaðu sumbingarnir at halda málið reint.

Onkuntíð máttu teir tó fáa hjálp frá træverkinum, og eina ferð varð eisin bjargað á málstrikuni. Inn vildi bólturin tó ikki, og tá Lassin so hevði bríkslað fyri seinastu ferð, kundu sumbingarnir fegnast um tey trý stigini, sum sigurin førdi við sær.

Um hetta verður nóg mikið til at tryggja víðari luttøku í kappingini kann ikki sigast nakað um enn, men í øllum førum var talan um eina góða byrjan, sum í fjør bjargaði tilveruni í fremstu deildini í seinastu sekundunum av landskappingini.

### Mugu reisa seg

Fyri NSÍ var talan um alt annað enn eina ynskibyrjan. Eftir dystin viðgekk venjari teirra, Trúgvi Mortensen, eisini, at spæl teirra so langt ífrá hevði verið nóg gott.

- Vit mugu bara vaska talvuna reina, og so vóna at vit kunnu reisa okkum komandi vikuskifti, tá vit skulu hitta VB á útivølli, vóru boðini frá venjaranum.

Sumba skal tá á heimavølli royna seg mótu greipuánarunum úr Klaksvík. Uttan iva ein stór uppgáva, men kanska hevur sigurin á runavíkingum givið mergjaðu monnunum trúnna uppá, at eisini henda uppgávan kann loysast.

**NSÍ-Sumba 0-1 (0-1)**

0-1 Eirikur Joensen

Dómari: Lassin Isaksen



# Stórsigur á Svangaskarði

*Løgmanssteypið: Sjey gul kort á lofti, tá tvey árstalsfeløg fóru undir bólkaspælið*



*Øssur Jacobsen leikti í vinstra borðið móti sandoyingum, og við skjótleika sínum var hann ein av atvoldunum til trivaliga B68 sigurin*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Niklas á Líðarenda fór sjey ferðir í lumman eftir ostaflísini, tá sandoyingar og toftamenn í góðum várveðri á Svangaskarði settu hol á bólkaspælið. Fýra sandoyingar og tríggir toftamenn vórðu skrivaðir í svørtu bók, og tað boðar frá, at talan var um nógvar nærdystir.

Hjá B68 vóru allir teir, sum eru komnir til felagið saman við Jóannesi Jakobsen, í hópinum. Einasti nýggi maðurin, sum var á beinkinum, var Eyðstein Skipanes, sum kom á vøllin, tá tað restaðu átjan minuttir.

Tveir av ungu monnunum, sum eru uppaldir í B68, vórðu eisini skiftir inn. Teir vóru Jann Ingi Petersen og Kristian Poulsen. Hesin seinni loysti Súna Fríða Johannesen av, og tað eydnaðist honum at tiltuska sær eitt brotsspark, sum Jan Petersen umsetti til mál.

Tað vóru átta minuttir eftir, tá Jan Petersen økti til 3–0. Inntil tá høvdu sandoyingar verið væl við í 2. hálvleiki, men so fór luftin úr teimum, og Marcello Marcolino (sneiddi framvið fleiri og eisini málverjanum, áðrenn hann trillaði í kassan) og Øssur Hansen (frágera gott fríspark úr 20 metrum og upp í hornið) kundu økja til 5–0.

Liðformaðurin Fróði Benjaminsen setti hol á eftir innlegg frá Marlon, tá 17 minuttir vóru farnir, og Marcello Marcolino var einsamallur við Valdemar Nowisci, tá hann økti til 2–0.

At talan var um fyrstu rættuligu royndina á árinum fjaldist ikki, men tað var týðuligt, at spælararnir eru betri fyri í ár, enn teir hava verið hesa tíðina fleiri av undanfarnu árum.

Allir teir fyrstu ellivu hjá B71 spældu við í fjør. Beinanvegin eftir steðgin komu Jógvan Jón Petersen, sum var lítið á liðnum í fjør, og Bernhard Petersen, sum áður hevur spælt í HB, á vøllin. Longu tá 17 minuttir vóru farnir, fór Julian Thomsen av vøllinum, tí hann var skaddur í handliðini.

JH

**B68–B71 5–0 (2–0)**

1–0: Fróði Benjaminsen 17.
2–0: Marcello Marcolino 37.
3–0: Jan Petersen br 82.
4–0: Marcello Marcolino 83.
5–0: Øssur Hansen 90.

Dómari: Niklas á Líðarenda

# Nógv nýtt fólk í Miðvági

*Løgmanssteypið: Hjá bæði HB og FS Vágum vóru fleiri ungir spælarar og nýggir útlendingar á liðunum*



*Rói Árting telist millum teir meira royndu HB leikararnar, sum framvegis eru á bestu liði felagsins*

Bæði FS Vágar og HB eru farin undir at seta nýtt ungt fólk við á besta fótbóltsliðnum, og á báðum liðunum skulu góðir útlendskir spælarar hjálpa til.

At nógv nýtt fólk var á vøllinum, og at talan var um fyrstu royndina á árinum sást væl í Miðvági (ætlanin er annars at heimadystirnir hjá FS Vágum í ár skulu spælast í Sørvági, men har skal nýggjur sandur leggjast á vøllin, áðrenn hann kann brúkast). Nærdystirnir vóru ikki nógvir, og leikferðin var ikki so ógvuliga høg.

Bæði málini komu í 1. hálvleiki. Ein av litavunum hjá FS Vágar, Bakus varð eftir tjúgu minuttir spældur leysur í vinstru og skoraði hjá Bárði Johannesen. Birgir Joensen hevði tveir góðar møguleikar at skora mál fyri heimaliðið, men hann misnýtti. Málið hjá HB skoraði Hans á Lag, tá bara ein lítil løta var eftir av fyrra umfarinum. Eftir aftur og fram sendi hann umvegis stólpan í meskarnar.

### Nýggju andlitini

FS Vágar hevði fýra litavar á liðnum. Málverjan kalla teir Remi, og í verjuketuni vóru Heðin Joensen, Silva, Darios, sum er stórur og góður aftasti maður og so ein av ungu vágamonnunum, sum eitur Jack Johansen. Á miðvøllinum var John Johansen mest framrættaður aftanfyri einsamalla álopsmannin, Birgir Joensen. Hinir fýra á miðvøllinum vóru Eyðfinn Davidsen, Tór–Ingar Akselsen, Albert Ari Thomassen og Bakus.

Sjúrður Ellefsen og Rúni Olsen, sum saman við Jack og Tór–Ingar hava verið við til at manna ungu landsliðini, komu inn í 2. hálvleiki. Tá kom Hannus Olsen eisini inn.

Hjá HB, sum spældi 3–5–2, var – sammett við føstu manningina í fjør – eitt hálvt nýtt lið. Jóhannes Joensen aftastur, og Hans á Lag og rumenarin Florin vóru miðverjar. Hallur Danielsen var ytstur í høgru, og ein av nýggju monnunum, Janus M. Joensen, var ytstur í vinstru. Á miðvøllinum vóru Rúni Nolsøe, rumenin Gigi og Símun Eliasen, og í álopinum vóru Jón Rói Jacobsen og Bárður Mortansson.

Í 2. hálvleiki komu veteranurin Rói Árting og ungu menninir Pætur Dahl og Jákup Lamhauge á vøllin. Hesin seinasti nevndi hevur ongantíð áður verið í nánd av besta liðnum.

JH

**FS Vágar–HB 1–1 (1–1)**

1–0: Bakus 12.
1–1: Hans á Lag 45.

Dómari: Jens Petur Brattalíð


STEYP OG HEIÐURSTEKIN

Vit hava Føroya størsta úrval av steypum og heiðursteknum.



Vit gravera (næstan) alt:

- El-talvur
- Skipstalvur
- Búmerkir
- Navnaskeltir
- Termokannur
- Pennar o.a.

3 arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR

SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR · TEL 355 355